ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit mugu gera pakistanum greitt, at megna teir tað ikki, tilskila vit okkum rætt til at fara hagar eftir bin Laden*

*Barrack Obama*

# Tvey lík í býti við fimm fangar

**Í Ísrael var sorg, í gjár tá líkini av tveimum hermonnum komu heimaftur, men í Libanon var veitsla, tí fimm fangar komu heim í býti við líkini av teimum báðum ísraelsku hermonnunum**



*Ein ísraelskur løgreglumaður saman við teimum fimm libansku fangunum, beint áðrenn teir vórðu latnir leysir*

*Mynd: Polfoto*

Klokkan hálvgum níggju gjáramorgunin vórðu fimm libanskir menn fluttir úr einum ísraelskum fongsli til býin Nahariya, sum er á markinum millum Ísrael og Libanon. Um somu tíð vóru menn hjá Hizbollah komnir til markið við tveimum kistum. Í teimum vóru líkini av tveimum ísraelskum hermonnum, sum Hizbollah tók til fanga undir krígnum millum rørsluna og ísraelska herin fyri tveimum árum síðani.

Eldad Regev og Ehud Goldwasser vórðu tiknir til fanga á sumri í 2006, og tað var tann tilburðurin, sum elvdi til kríggið millum Ísrael og Hizbollah, og sum vardi 33 dagar og kostaði 1.200 libanum og 160 ísraelsmonnum livið.

Fýra av teimum fimm libansku fangunum, sum sluppu úr ísraelska fongslinum í gjár, eru limir í Hizbollah og vórðu tiknir til fanga undir krígnum fyri tveimum árum síðani. Tann fimti, Samir Kantar, var við í einum álopi í Ísrael í 1979, sum hann fekk lívlanga fongsulsrevsing fyri. Ísraelskir fjølmiðlar skrivaðu í gjár, at landsins forseti hevði givið Samir Kantar fyrigeving, men at forsetin var ikki vitandi um, at tað var tað sama sum at veita honum grið og lata hann leysan.

### Sorg og fagnaður

Meðan ísraelsmenn hildu tøgn til minnis um teir báðar hermenninar, vórðu teir fimm libansku fangarnir heilsaðir sum hetjur, tá teir komu um markið. Fram við strandarvegnum millum marknabýin Nakura og havnarbýin Saida hingu fløgg og skelti, sum heilsaðu teimum fimm.

Sum lið í avtaluni við libansku myndugleikarnar er Ísrael gingið við til at lata libanum leivdirnar av umleið 200 monnum, sum eru falnir í samanbrestum við ísraelska herin tey seinastu árini.



*Eldad Regev og Ehud Goldwasser komu aftur til Ísraels í kistum*

*Mynd: Polfoto*

# Grand Canyon á Mars

**Við framkomnari myndatøkni hevur evropeiska rúmdarstovnurin ESA gjørt nakrar sera góðar myndir av gongustjørnuni Mars**



*Økið minnir um Grand Canyon, og her hevur vatn verið einaferð, siga granskararnir*

*Mynd: ESA*

Myndirnar av Mars hevur rúmdarfarið Mars Express tikið. Tær eru tiknar soleiðis, at tær geva eina sera góða lýsing av, hvussu tað sær út uppi á teirri reyðu gongustjørnuni, sum Mars vanliga verður kallað, og sum er millum 56 og 103 milliónir kilometrar frá Jørðini.

ESA brúkar eina serliga tøkni, har fleiri myndir av sama staði verða tiknar við ymsum vinklum og síðani lagdar oman á hvør aðra. Á hendan hátt ber til at fáa myndir, sum eru betri, enn vanlig myndatøkni klárar, sigur ESA.

Á myndunum, sum ESA hevur almannakunngjørt hesaferð, sæst landslag, ið minnir um Grand Canyon í USA. Hetta er í økinum við Echus Chasma, sum er beint norðan fyri ekvator á Mars. Granskarar halda, at vatn hevur verið á hesum leiðinum eina ferð í tíðini.

Echus Chasma er eitt 100 kilometrar langt og tíggju kilometrar breitt láglendi í hálandinum Lunar Planum. Tann størsti dalurin í økinum eitur Kasei og er sambært granskarunum umleið fýra kilometrar djúpur.

STUTT SAGT

## Inflasjón 2,2 mió. prosent

Inflasjónin í Zimbabwe veksur við rúkandi ferð. Fyri fimm mánaðum síðani kunngjørdu myndugleikarnir, at inflasjónin var komin upp í 165.000 prosent, og í gjár vistu teir almennu fjølmiðlarnir at siga, at nú er inflasjónin komin upp í heili 2,2 milliónir prosent. Eina ferð var Zimbabwe ríkasta land í Afrika, men í dag liggur búskapurin í skeljasori. Tann harðrendi einaræðispolitikkurin hjá Robert Mugabe, forseta ger, at altjóða samfelagið hevur lítlan og ongan hug at hjálpa Zimbabwe burtur úr teirri syndarligu støðuni.



*Pengaseðlar í Zimbabwe. Legg merki til tølini*

*Mynd: AP*

## Ráðharri fordømir burka

Franski ráðharrin Fadela Amara sigur segc taka undir við úrskurðinum hjá einum dómstóli, sum hevur sýtt fyri at geva einari kvinnu úr Marokko franskan ríkisborgararætt, tí hon gongur í burka, sum fjalir allan kroppin og andlitið.

Fadela Amara, sum er muslimur, sigur seg vóna, at úrskurðurin hjá dómstólinum fer at fáa ráðaríkar muslimskar menn í Fraklandi at gevast við at krevja, at konur teirra skulu ganga í burka. Við blaðið Le Parisien sigur ráðharrin, at tað at krevja, at kvinnur skulu ganga í burka, er sum at koyra tær í fongsul.

Konan, sum ikki kann fáa franskan ríkisborgararætt, tí hon gongur í burka, er 32 ára gomul og hevur búð í Fraklandi síðani 2000. Hon er gift og eigur trý børn, sum øll eru fødd í Fraklandi.



*Burka fjalir alt uttan eyguni*

*Mynd: AFP*